

## Úrslit frá 1500 m frí

1. Pál Joensen (FAR) 15.18.37
2. Krzysztof Pielowski (POL) 15.24.63
3. Raoul Shaw (FRA) 15.25.02
4. Gareth Keating (GBR) 15.28.18
5. Alessandro Coughi (ITA) 15.30.38 (tíðin er frá b-finaluni)
6. Pavel Medvetskiy (RUS) 15.33.62
7. Gergely Gyurta (UNG)15.40.93 (tíðin er frá b-finaluni)
8. Artem Podyakov (RUS) 15.41.01
9. Martin Grodzki 15.45.37
14. Jack Dunn (GBR) 16.00.26 (svam í A-finaluni, men endaði nummar 14)

# bukaðir

Ímeðan sótu foreldur, lítlibeiggin, gentan og vinfólk hjá familjuni í Vági við café'ina ovast á Tašmajdan svimjistadion og fingu ein svalandi drykk í skýmingini. Hýrurin var sjálvsagt góður, og telefonirnar sungu við, tá smsboðini vunnu vegin fram úr Vági til Beograd.

- Nei pínadoy. Nú hava tey skotið rakettir har heima, og bilarnir floyta í gøtunum, ljóðar ein av staðfestingunum við borðið eftir at samband hevur verið norðureftir.

Brádliga hómast teir aftur niðri við hylin. Pál Joensen leypir útí og brýtur eina løtu spegilsklára vatnið á Tašmajdan. Ringarnir í vatninum órógva seinastu, lýsandi tølini frá úrslitatalvuni við hylin, og eina løtu ber ikki til at lesa reyðu tølini, sum speglast í vatnskorpuni. Jón Bjarnason setir seg at húka við kantin.

Friðurin er fullkomin, og tað tykist sum tvífaldi evropameistarin blívur eitt við vatnið og serbiska kvøldið.

Allir hinir svimjararnir frá finaluni á 1500 metrum eru langt síðani farnir avstað. Silvurvinnarin, bronsuvinnarin og hinir fimm. Bara meistarin er eftir á Tašmajdan.

Pál kemur uppaftur úr vatninum og prátar róliga við sín venjara. Hása røddin hjá Maluni Bærentsen sker seg ígjøgnum kvøldarkvirruna, haðani hon stendur niðast á áskoðaraplássunum. Pál vendir sær og smílist. Jón hevur hug at arga eina løtu, og sigur at teir mugu fara avstað beinanvegin. Teir flenna, og Pál leypir síðani niðan til hennara. Jú, hann fær tíð til at geva gentuni ein muss, áðrenn bussurin koyrir teir báðar heim á Hotel Continental at sova.



*Ein gyltur kossur í serbiska kvøldinum. Pál Joensen fekk ein minutt at heilsa upp á gentuna hjá sær, Maluna Bærentsen, eftir at hann var blivin tvífaldur evropameistari fyri juniorar.*

*Mynd: Jón Brian Hvidtfeldt*



*Pál Joensen ovast á sigursskamlinum fyri aðru ferð. Við blómutyssi í hond og gullkrónu um hálsin, meðan hann letur seg fagna av fjøldini*